# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 17.09.2025 |
| Mál nr.: | 25/07204 |
| Málsviðgjørt: | DH |
| Ummælistíð: | - |
| Eftirkannað: | - |

**Uppskot til**
**løgtingslóg**
**um**
**javning av skattastigum og avgjøldum**

**§ 1.** Fyri hvørt ár verður lýst eitt lønarvísital og eitt avgjaldsvísital, ið verða nýtt til at javna skattastigan, frádráttir og avgjøld o.l. sum eru eru nevnd í §§ 5 og 6 í hesi løgtingslóg.

**§ 2**. Lønarvísitalið fyri eitt ár verður roknað sum miðinntøkan tvey ár frammanundan, býtt við miðinntøkuna í 2023 falda við 100.
*Stk. 2.* Nýtta miðinntøkan er miðinntøkan av A-inntøkum, hjá øllum persónum, sum hava fingið A-inntøku hvønn mánaða í inntøkuárinum, sambært Hagstovuni.

**§ 3.** Avgjaldsvísitalið verður sett til 100 fyri 2025. Vísitalið veksur 2% um árið.

**§ 4.** Landsstýrisfólkið lýsir kunngerð lønarvísitalið og avgjaldsvísitalið við einum desimali fyri næstkomandi inntøkuárið í seinasta lagi 1. semptember.

**§ 5.** Lønarvísitalið verður nýtt til at javna:

1) inntøkumørk í § 1 í løgtingslóg um áseting av skatti, rundað av til nærmastu 1.000 kr.
2) Barnafrádráttir í § 2 í løgtingslóg um áseting av skatti, rundað av til nærmastu 100 kr.

**§ 6.** Avgjaldsvísitalið verður nýtt til at javna:

1) avgjøld, sum eru ásett í krónum sbrt. løgtingslóg um avgjald á freimleiðslu og innflutningi.
2) Brennioljugjald sbrt. løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju.
3) Avgjaldsmørk í krónum í virðisavgjaldi ásett sbrt. § 3 í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum
4) Veg- og umhvørvisgjøld ssbrt. skjali 1 í løgtingslóg um veg- og umhvørvisgjald av motorakførum o.a.

**§ 7.** Landstýrisfólkið lýsir javnaða skattastigan, frádráttir, avgjøld og

avgjaldssmørk fyri næstkomandi inntøkuárið í seinasta lagi 1. november.

**§ 8.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Samgongan ætlar, at skattastigin verður javnaður. Hetta er lutvíst gjørt í sambandi við skattaumleggingina, sum varð samtykt í desember 2023.

Føroyski búskapurin hevur seinni árini havt stóra framgongd. Hetta merkir, at stigvaksandi trinini í inntøkuskattinum og avgjøld, sum eru krónur pr. eind, fylgja ikki við gongdini, tá ið prísirnir í samfelagnum vaksa. Veruligi skatturin broytist tískil yvir tíð, uttan at løgtingið hevur avgjørt tað. Hetta ger, at politiska skipanin við jøvnum millumbili skal taka støðu til somu ting umaftur.

Við at árliga javna avgjøld og skattir, fær politiska skipanin betur orku til at loysa aðrar týdningarmiklar avbjóðingar.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Eingin skipan er um javning av skattum og avgjøldum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við skipanini er at javna skattastigan, avgjøld o.l. á ein einfaldan og skilagóðan hátt, sum ger skatta- og avgjaldsskipanina meira haldføra.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Fyri hvørt ár verður kunngjørt eitt lønarvísital og eitt avgjaldsvísital, ið vera nýtt til at javna skattastigan, frádráttir, avgjøld. v.m.

*Lønarvísitalið og javning av skattastiga og frádráttum*

Lønarvísitalið fyri 2025 er 100 og fylgir vøkstrinum tvey ár framman undan. Tað merkir, at lønarvísitalið fyri 2026 er 100 plus vøksturin í miðinntøkuni frá 2023 til 2024.

Nýtta miðinntøkan, er miðinntøkan av A-inntøkum, hjá øllum persónum, sum hava fingið A-inntøku hvønn mánaða í innárinum. Hagstovan ger tølini upp og fær yvirlit yvir A-inntøkur frá TAKS.

Orsøkin til at miðinntøka verður nýtt í staðin fyri miðalinntøkan, er at miðinntøka betur vísir gongdina hjá breiðu fjøldini og ikki verður ávirkað av um onkur lítil bólkur ella einstaklingur bráddliga hevur ein serliga stóra inntøku.

A-inntøkuhugtakið er greitt og væl roynt í skattafyrisitingini. Harafturat verður í fylgilóg til hetta lógaruppskotið gjørt eitt uppskot um at strika heimildina hjá landsstýrisfólkinum í skattalógini at nágreina A-inntøkuhugtakið. Tí er greitt júst hvussu A-inntøkuhugtakið verður javnað.

Talvan niðanfyri vísir hvussu miðvirðisinntøkan er vaksin síðstu árini.

| | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| miðvirðisinntøka* | 362.839 | 372.587 | 376.169 | 387.389 | 401.312 | 420.956 |
| vøkstur í mun til árið fyri | 2,3% | 2,7% | 1,0% | 3,0% | 3,6% | 4,9% |

Um skattastig og barnafrádráttur vórðu javnað í 2026 høvdu tey sæð soleiðis út:

| | 2025 | 2026 |
|---|---|---|
| vísital | 100 | 104,9 |
| kommunuskattur | 30.000 | 31.000 |
| landsskattastig | 65.000 | 68.000 |
| | 180.000 | 189.000 |
| | 235.000 | 247.000 |
| | 330.000 | 346.000 |
| | 450.000 | 472.000 |
| | 600.000 | 629.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Barnafrádráttur | | |
| 0-6 ár | 9.200 | 9.700 |
| 7-17 ár | 6.500 | 6.800 |

Av tí at lógin ikki fær gildi fyrrenn í 2026, ber ikki til javna fyrstu ferð fyrrenn í 2027 og tá fyri tvey ár.

*Avgjaldsvísitalið og javning av avgjøldum og avgjaldsstigum.*

Avgjaldsvísitalið verður sett til 100 fyri 2025. Vísitalið veksur 2% um árið.

Í Danmark vera avgjøld javnaði við gongdina í prísunum. Tað merkir m.a. at avgjøldini hækka nógv, tá prísvøksturin er høgur. Tað kann vera vera óheppið, tí tað ger sveiggini í prísum enn størri.

Heldur enn at javna avgjøld við gongdina í prístalinum verður skotið upp, at avgjøld, sum eru í krónum, árliga hækka 2%, sum er inflatiónsmálið hjá ECB. Fyrimunirnir við tí eru, at yvir tíð kemur javningin at passa við prísgongdina, uttan at fylgja við inflatiónssveiggjum frá árið til ár.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið er lagt á almenna hoyringarportalin og á heimasíðuna hjá Fíggjarmálaráðnum til almenna hoyring. Uppskotið er sent beinleiðis til ummælis hjá:

TAKS
Hagstovuni
Gjaldstovuni
Vinnuhúsinum
Fakfelagssamstarvinum
Akstovuni

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Javning av skatti og avgjøldum, kostar í prinsippinum einki. Endamálið er at varðveita eitt javnt skatta- og avgjaldstrýst. Men í mun til verandi støðu, har samlaða skattatrýstið hækkar yvir tíð, kemur tað sjálvsagt at kosta. Um avgjøld verða hækkað 2% og skattastigini 3%, er ávirkanin um 8 mió. um árið. Avgjøld hækka tilsamans 10 mió. kr, ímeðan barnafrádrátturin økist um 3 mió kr. og inntøkuskatturin minkar um 15 mió. kr. um árið (harav eru 3 mio. kr orsakað av kommunuskattinum).

Hinvegin kann argumenterast fyri, at skipanin við árligari javning ger samlaðu skattaskipanina meira politiskt haldføra, tí trýstið á at gera broytingar við stuttum millumbilum minkar.

*Ávirkanin av javnaðum avgjøldum*

| | Avgjald (2025) | Javning (2%) |
|---|---|---|
| Punktgjøld (krónur) | - 200.000.000 | - 4.000.000 |
| Brennioljugjald | - 136.000.000 | - 2.720.000 |
| Vegskattur | - 145.000.000 | - 2.900.000 |
| Tilsamans | - 481.000.000 | - 9.620.000 |

Javnað verður fyrstu ferð í 2027 og tá verður javnað fyri tvey ár og harafturat er inntøkuvøksturin frá 2023 til 2024 nakað hægri enn vanligt. Tí verður kostnaðurin mettur til 15-20 mió.kr. í 2027 fyri bæði land og kommunur. Hetta skal síggjast í ljósinum av, at inntøkur frá skatti og avgjøldum eru 9,8 mia.kr.

Yvir tíð fer uppskotið ikki at merkja nakað. Tá verður tað innbygt í skipanina, at skattastigin og nominellu avgjøldini broytast hvørt ár og harvið er ikki ein sjálvvirkandi skattahækking og avgjaldslækking hvørt ár.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Fíggjarmálaráðið skal rokna lønarvísitalið og lýsa hetta í kunngerð. TAKS skal gera broytingar í skipanum hvørt ár.Umhugsað verður at gera eina forskipan hjá TAKS, sum ger tað lættari at broyta nominellu avgjøldini. Mett verður, at hetta kann gerast innan verandi umsitingarorku hjá Fíggjarmálaráðnum og TAKS.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.
...

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað eru ikki kendir millumtjóðasáttmálar á økinum.
...

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
..
Lógaruppskotið er í samsvari við:

1) **Hoyvíkssáttmálin**

2) **Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS**

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

**2.9. Markaforði**ngar
Tað eru ikki markaforðingar á økinum.
...

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
**Lógaruppskotið he**vur ikki ásetingar um revsing.
...

**2.11. Skattir og avgjøld**
..

**2.12. Gjøld**
**Lógaruppskotið hevur ikk**i ásetingar um gjøld**.**
...

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
**Lógaruppskotið leggur ikki skyld**ur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.
...

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
**Lógaruppsk**otið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið.
..

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.
...

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.
...

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**
...

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**
Hvørt ár verður lýst eitt lønarvísital og eitt avgjaldsvísital, sum javnað verður eftir.

**Til § 2**
Víst verður hvussu lønarvísitalið verður roknað.

**Til § 3**
Avgjaldsvísitalið verður sett til 2% fyri hvørt ár. Hetta svarar til langtíðarinflatiónsmálið hjá Evropeiska miðbankanum.

**Til § 4**
Landsstýrisfólkið fær í kunngerð heimild til at kunngera hvat lønarvísitalið og avgjaldsvísitalið er fyri komandi ár. Tað verður lýst við einum decimali. Niðanfyri er eitt dømi um avgjald á rúsdrekka, sum er 330,00 kr. pr. ltr. reint alkohol

| | **ár 0** | **ár 1** | **ár 2** | **ár 3** | **ár 4** | **ár 5** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Avgjaldsvísitalið | 100,0 | 102,0 | 104,0 | 106,1 | 108,2 | 110,4 |
| Avgjald á rúsdrekka | 330,00 kr | 336,60 kr | 343,20 kr | 350,13 kr | 357,06 kr | 364,32 kr |

**Til § 5**
Ásetingin lýsir, hvussu avrundanin av lønarvísitalinum verður gjørd. Tað merkir, at mørkini í botnfrádráttinum flytast við 1000 kr. hvørja ferð. Er botnfrádrátturin 65.000 kr. og lønarvísitalið er 103 so verður botnfrádrátturin rundaður frá 66.950 til 67.000.
Er barnafrádrátturin 9.200 so verður hann rundaður frá 9.476 til 9.500.

**Til § 6**
Hendan ásetingin vísir hvørji nominell avgjøld verða javna.

**Til § 7**
Landsstýrisfólkið skal í seinasta lagi 1. novembur hava lýst kunngerðina fyri komandi ár.

**Til § 8**
Áseting um gildiskomu

Fíggjarmálaráðið, 17. septembur 2025.

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: